# B36 roynir brasilianskan spælara

**Næstu dagarnar skal Alex Dos Santos royna at sannføra B36 um, at hann kann styrkja um liðið hjá teimum**

FÓTBÓLTUR
*Jonhard Hammer*

B36 hevur í vetur fingið fleiri nýggjar føroyskar spælarar í hópin, men nú eru eisini onkrir útlendingar upp á tal. Málverjin Henrik Bødker royndarvenur í felagnum í hesum døgum, og nú er eisini ein brasilianskur spælari komin til Havnar.

Alex Dos Santos hevur seinastu mánaðirnar hildið til í danska superligafelagnum Frem, men har hevur hann fingið lítið av spælitíð.

### Vænta góðan spælarar

Santos vandi við B36-liðnum fyrstu ferð hóskvøldið, og hann kemur ivaleyst at spæla við í onkrum dysti komandi dagarnar.

– Vit ivast ikki í, at hann er ein góður spælari, tí annars hevði hann ikki verið keyptur til eitt danskt superligafelag. Santos hevði trupulleikar við samskiftinum í Frem, men føroyskur fótbóltur er øðrvísi, og so er spurningurin bara um hann kann sláa til í Føroyum, sigur Kristian á Neystabø, formaður í B36.

### Spældi í 10 minuttir

Tað var fyrrverandi venjarin hjá Frem, Ole Mørk, sum fekk Santos til felagið, og brasilianski spælari kom eisini á vøllin í fyrsta dystinum í hesum kappingarárinum.

Tað var ímóti OB, men hann var tikin út aftan á 10 minuttir.

Orsøkin til tað var ein ørvitistakkling, sum Ole Mørk ikki vildi finna seg í. Síðani hevur Santos ikki spælt fyri Frem, og har kalla teir hann »10-minuttir mannin«.

Nú er nýggjur venjari í Frem, Ebbe Skovdahl, og hann hevur brúkt Santos í sínum hópi. Tí hevur Frem gjørt av, at Santos kundi fara til Føroyar at royna seg.



*Alex Dos Santos roynir seg næstu dagarnar í B36*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Gongur væl hjá Holte

**Felagið hjá teimum báðum føroysku landsliðsleikarunum í flogbólti, Bárður Mikkelsen og Ragnar í Haraldsstovu, Holte, spælir í løtuni um at blíva í bestu donsku flogbóltsdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Felagið, ið teir báðir føroyingarnir leika við, er annars eitt tað mest siðvanda flogbóltsfelagið í Danmark, men í ár hevur tað ikki gingið eins gott og vanligt. Av hesi orsøk noyddust Bárður og Ragnar saman við liðfeløgum sínum at spæla í sonevnda kvalifikatiónsbólkinum til elitudeildina. Í hesum bólki eru seks lið, og tvey teirra koma víðari. Í løtuni liggur Holte á odda ájavnt í stigum við Hvidovre á øðrum plássi, men Hvidovre hevur spælt ein dyst færri.

### Ragnar ikki við í føroyingaruppgerð

Ragnar í Haraldsstovu hevur í løtuni trupulleikar við rygginum, og tískil hevur hann ikki vant og spælt við í seinastuni, men vónandi verður hann skjótt tøkur aftur.

Í teldubrævi úr Danmark sigur Bárður Mikkelsen, at tað gekk heilt væl í báðum dystunum. Tann fyrri var ímóti Rosenlund Volley úr Skovlunde, og har vann Holte ein tryggan 3-0 sigur. Settúrslitini vóru 25-21, 25-20 og 25-14!

Seinni dysturin var ímóti Amager VK við føroyinginum Jóhann Nielsen á liðnum. Hetta var mett sum ein truplari uppgáva, tí Amager hevði vunnið tveir teir seinastu dystirnar, og vóru teir tískil fullir av sjálvsáliti udnan dystinum móti Holte. Liðini fylgdust fyri tað mesta í hesum dystinum, men tá ið Holte setti ferð á spælið hjá sær, megnaði Amagar ikki at halda tørn, greiðir Bárður frá úr Danmark. Holte vann dystin 3-1, og nú verður sæð fram til næsta dystin. Hann er um einar tvær vikur, og tá eru tað oddaliðini bæði í bólkinum, Holte og Hvidovre, ið dystast í Hvidovre, so tá verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer.

**Støðan í bólkinum hjá Holte:**

| | K | V | T | Score | P |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Holte IF | 6 | 5 | 1 | 17-5 | 10 |
| 2 Hvidovre V K | 5 | 5 | 0 | 15-6 | 10 |
| 3 Bedsted KFUM | 6 | 4 | 2 | 13-9 | 8 |
| 4 Rosenlund Volley | 6 | 2 | 4 | 11-12 | 4 |
| 5 Amager VK | 7 | 2 | 5 | 9-16 | 4 |
| 6 ASV Århus | 6 | 0 | 6 | 1-18 | 0 |

# Írland fekk javnt móti heimsmeistarunum

**Øll tey londini, ið Føroyar eru í undanbólki við til komandi HM-kappingina, spældu venjingardystir mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Navnframasta fótbóltstjóðin í bólkinum hjá føroyingum er uttan iva Frakland. Fronsku europameistararnir leiktu mikukvøldið venjingardyst ímóti Belgia í Brussel. Hjá franskmonnunum var álopið nakað skert, tí tær báðar superstjørnurnar, Thierry Henry og David Trezeguet, vóru ikki við vegna skaða. Ístaðin leikti ein annar kendur maður, Louis Saha, ið fyri kortum skifti úr enska felagnum Fulham til stórfelagið Manchester United, har hann hevur fingið eina sera góða byrjan við trimum málum í trimum dystum. Dysturin í Belgia mikukvøldið var fyrsti landsdysturin hjá Louis Saha, og hann gjørdist eisini minnisríkur hjá unga franskamanninum. Saha skeyt seinna málið í 2-0 sigrinum eftir eitt frálíkt upplegg frá Zinedine Zidane.

### Írar høvdu vitjan av heimsmeistarunum

Eitt annað av komandi mótstøðuliðum okkara, Írland, hevði mikukvøldið vitjan av heimsmeistarunum úr Brasil. Á Landsdowne Road í Dublin vóru teir mongu áskoðararnir vitnir til ein undirhaldandi men tó málleysan dyst. Írar komu best frá byrjan, og millum annað høvdu bæði Stephen Carr og Robbie Keane góðar møguleikar at leggja írar á odda, uttan at hetta tó eydnaðist teimum. Móti endanum av dystinum var fullmannaða brasilianska landsliðið nær við avgera, men Ronalda skeyt beint á Newcastle-málverjan, Shay Given, og Ronaldinho rakti træverkið.

Sveits er eitt lið, ið føroyingar áður hava verið í bólki saman við, men í løtuni tykjast sveisar sterkari enn nakrantíð. Liðið hevur spælt seg til endaspælið um europameistaraskapið í Portugál í summar, og mikukvøldið dystaðust teir á útivølli við afrikansku varameistarunum úr Marokko. Hesin dystur var málleysur heilt fram til seinsta korterið, men so gjørdu marokkanar tvey skjót mál, og í seinasta minuttinum minkaði Alexander Frei fyri Sveits til endaliga úrslitið 2-1 til Marokko. Her skal tó nevnast, at Marokko júst hevur tikið lut í endaspælinum um afrikanska meistaraheitið, og tí er liðið ógvuliga væl samanspælt í løtuni.

Tey bæði seinastu liðini í bólkinum hjá føroyingum eru Ísrael og Kypros. Ísraelar leiktu mikukvøldið heima ímóti Aserbadjan, og teir vunnu ein sannførandi sigur á heili 6-0! Kypriotar leiktu eisini á heimavølli, og tað var ímóti Hvítarusslandi. Her gekk minni gott hjá heimaliðnum, tí hvíturussar vunnu 2-0 eftir hálvleiksstøðuna 1-0!

### Eisini aðrir áhugaverdir dystir

Fleiri aðrir áhugaverdir dystir vóru eisini á skránni mikukvøldið. Danir vóru á vitjan í Turkalandi, og her eydnaðist tað dønum at vinna 1-0 við einum máli, ið Martin Jørgensen skoraði. Í donskum fjølmiðlum stendur at lesa, at danska avrikið var sera sannførandi.

Í Portugál høvdu EM-vertirnir vitjan av David Beckham og liðfeløgum hansara á enska landsliðnum. Hesin dystur endaði við javnleiki 1-1. Tottenham-verjuleikarin Ledley King, sum leikti sín fyrsta dyst á enska landsliðnum, legði Ongland á odda 1-0 beint eftir steðgin, men miðskeiðis í seinna hálvleiki javnaði Paris Saint Germain - leikarin Pauleta fyri Portugál við einum framúr góðum frísparksmáli.

Nýggi norski landsliðsvenjarin, Åge Hareide, hevur fingið eina sera góða byrjan í starvinum. Mikukvøldið leiktu normenn á Windsor Park í Belfast ímóti norðurírum, og normenn vunnu 4-1! Tað man verða langt síðani, at norska landsliðið hevur skorað fýra mál í einum og sama dysti.

Vikuskifti

Nr. 36 • leygardagur • 21. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Brandur Enni í Cape Town
Ferðafrásøgn
Lesið síðu 2–3



# Listarinnar sendistova

Í 25 ár hevur danin Kurt Svendsen skipað fyri málingaframsýningum í Keypmannahavn við føroyskum listafólki. Alt byrjaði við einum málningi hjá Amariel Norðoy av kirkjuni í Mikladali.

*Orð og myndir: Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@kallnet.fo*

- Á ein hátt ber til at siga, at eg havi verið eitt slag av umboðsmanni fyri føroysk listafólk. Fryntligi eigarin av gallarí Sct Gertrud, Kurt Svendsen, festir sær í pípuna og leggur skemtiliga afturat, at gallaríið hjá sær helst hevur verið sum ein sendistova hjá føroyskari list.

Í nærum ein mansaldur hevur hann átt og rikið egið gallarí í Keypmannahavn, fyrst í Sct Gertrud Stræde, tætt við Kultorvet, men seinastu 15 árini í Hyskenstræde 9, ið er ein síðugøta til Strøget.

Men tað var av reinari tilvild, at Kurt Svendsen kom í samband við føroyska list. Hann minnist, at hann ein várdag seinast í sjeytiárunum hevði eitt ørindi inni á grafiska verkstaðnum UM í Keypmannahavn, ið forrestin ikki er til longur, tá hann bar eyga við ein málning. Tá hann spurdi seg fyri, hvat málningurin ímyndaði, fekk hann at vita, at tað kundi hann sjálvur spyrja listamannin um, tí hann var staddur í sama høli.

Listamaðurin var Amariel Norðoy, og málningurin var av kirkjuni í Mikladali.

– Hóast eg tá hevði mítt egna gallarí, kendi eg als einki til føroyska list. Men eg bleiv bergtikin av hesum málningi.

Teir báðir avreiddu, at Amariel skuldi hava eina framsýning í gallarínum hjá Kurt Svendsen sama heyst. Svendsen minnist, at henda framsýning gekk ikki sum ætlað.

– Amariel hevði havt fleiri málningar við á eini framsýning í Týsklandi, men verkfall gjørdi, at hann ikki fekk málningarnar heim aftur til framsýningina í gallarínum hjá mær. Fyri at fylla veggirnar noyddist hann tískil út at lána nakrar málningar frá føroyingum, ið búðu á Keypmannahavnarleiðini. Men eg minnist, at hann so fekk selt ein málning til Dansk Tipstjeneste.

Síðan hevur Amariel Norðoy á hvørjum vári havt framsýning í gallarínum hjá Kurt Svendsen.

### Ingálvur og Mykines

Kurt Svendsen metir, at nógv er broytt, síðan hann hevði fyrstu framsýning við føroyskari list seinast í sjeytiárunum.

– Tá eg byrjaði, kendu danir sera lítið til føroyska list. Fólk kendu málningarnar hjá Ingálvi av Reyni og Mykines, men tað var so at siga tað einasta. Í dag eru nógv føroysk listafólk kend nøvn í Danmark, og áhugin millum danir fyri føroyskari list er vaksandi.

Kurt Svenden leggur afturat, at serliga fyrstu árini nýtti hann nógva orku til at samskifta við listafeløg, fyri á tann hátt at fáa føroysku málningarnar sýndar fram kring um í Danmark.

– Tey vóru fá, ið kendu føroysku listina. Men eg kundi vísa á góðar, traditionellar málningar, og sum fráleið fingu alsamt fleiri eyguni upp fyri føroysku listini. Tað stuttliga er, at í dag eru nógv kend nøvn millum føroysku listafólkini.

Kurt Svendsen hevur á ein hátt gjørt tað til sína sergrein at sýna fram føroyska list umframt list, ið hevur eitthvørt samband við Føroyar. Umframt at hann er við á stóru listastevnunum í Herning og í Forum í Keypmannahavn, hevur Kurt Svendsen vanliga umleið átta framsýningar um árið í hølunum í Hyskenstræde, og av teimum hava Amariel Norðoy og Øssur Mohr hvør sína. Harumframt hava nógv onnur føroysk listafólk havt framsýning í Sct Gertrud, umframt donsk listafólk, ið hava nýtt føroysk motiv í sínum málningum.





*Seinastu 15 árini hevur Kurt Svendsen havt egið gallarí í Hyskenstræde 9, ið er ein síðugøta til Strøget í Keypmannahavn. Hann hevur gjørt tað til sína sergrein at sýna fram føroyska list*

### List til ferðafólk

Kurt Svendsen er eisini stoltur av, at hann hevur verið við til at breiða føroyska list út til ein stóran skara, ið kanska annars ikki hevði komið í samband við listina. Tað kom í lag, eftir at danska loftvegis ferðasambandið til Føroya, ið tá bar navnið Dan-Air, byrjaði at merkja kappingina frá Atlantic Airways.

Sum liður í eini roynd at fáa fleiri ferðafólk spurdi felagið Kurt Svendsen, um føroysk list møguliga á ein ella annan hátt kundi nýtast í eini lýsingarherferð. Úrslitið varð, at Kurt Svendsen valdi málningar hjá umleið 15 føroyskum listafólkum, ið síðan vóru avritaðir og prentaðir á góðum pappíri. Í umleið eitt ár fekk hvørt ferðafólk eitt eintak av føroyskari list heim við sær.

– Á henda hátt bóru nógv eyga við føroysku listina. Eg minnist, at bara í juli mánað vóru latin umleið 7000 eintøk, og sjálvur haldi eg, at hetta hevur verið við til at breiða boðskapin um og skumpa undir føroysku listina sum vinnugrein.

### Við góðum treysti

Hóast tað er tungt at reka eitt gallarí í Keypmannahavn, har tilboðini til íbúgvarnar eru nærum óteljandi, so ætlar Kurt Svendsen sær at halda á, so leingi tað er stuttligt.

Ikki óvæntað hevur listin hansara stóra áhuga, og eftir nógv ár í fakinum veit hann, hvat hann vil hava hangandi í sínum gallaríi. Tí, sum hann sigur, so skal eitt gallarí hava ein ávísan stíl.

– Mær dámar væl, tá tað sæst aftur í málninginum, at listafólkið hevur haft eitt ávíst motiv at arbeiða út frá, og so má málningurin gjarna vera abstraktur. Men eg kundi til dømis ikki hugsað mær at sýnt fram alt ov modernaða ella alternativa list, sigur Kurt Svendsen at enda.